## ÍF Føroyar endaði á fjórða plássi

Nú kappingin er at enda komin gjørdist greitt, at ÍF Føroyar endaði á einum fjórða plássi í Københavnsserien, sum telur fjúrtan liðum. ÍF Føroyar var seks stig aftanfyri liðini á øðrum plássi, sum hevði givið møguleika fyri uppflyting. ÍF Føroyar tapti tríggjar teir fyrstu dystirnar eftir summarsteðgin, tá liðið var illa mannað, og tað var ein dyggur smeitur.

Julian Hansen hevur saman við Frankie Jensen verið venjarar hjá liðnum í hesum kappingarárinum. Frankie og Julian høvdu felags ábyrgd av liðnum fyri summarsteðgin, men eftir at Frankie gjørdist venjari hjá Skjold, hevur Julian havt evstu ábyrgd av liðnum.



## FCK vann nýklassikaran

Brøndby skuldi gera eina seinastu roynd at bjarga árinum, sum longu mest sum er farið, tá teir vitjaðu í Parkini hjá FCK. FCK hevur í ár verið mest sum einaráðandi í donsku SAS-liguni, og sunnudagurin varð einki undantak í so máta. Við tveimum málum frá Marcus Allbäck og einum frá Martin Bergvold beindu vertirnir allan iva av vegnum, og so hjálpti tað lítið, at Henrik Kildentoft fekk minkað um munin móti dystarenda.

## Dýr fartelefon

**Eitt móttikið SMS beindi alla vón um neyðugu IM-stigini, tá Helgi Dam Ziska varð diskaður í talvinum móti Hans Kristian Simonsen**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at hann leygardagin byrjaði væl við sigri á IM Jens Ove Fries-Nielsen, gekst minni væl, hjá Helgi Dam Ziska í næsta degnum av Klaksvík International.

Tvey talv vóru á skránni sunnudagin, og báðu ferðirnar tapti Helgi. .í 2. umfari tapti hann við svarta fólkinum ímóti svenska IMaranum Emil Hermansson, og í 3. umfarinum kiksaði av álvara .Helgi hevði nevniliga gloymt at sløkt fyri fartelefonini, og tá hann undir talvinum fekk eitt SMS sendandi, var hetta nóg stór orsøk at verða diskvalifiseraður.

Fremsti føroyingurin eftir trý umfør er Martin Poulsen. Eftir sigurin á Hans Kristiani Simonsen í fyrsta umfari vann Martin í 2. umfari við hvítum á IM Jens Ove Fries-Nielsen. Í triðja umfari noyddist Martin við svarta fólkinum at lúta fyri stórmeistaranum Henrik Danielsen.

Støðan eftir 3. umfar

| | |
|---|---|
| 1 IM Emil Hermansson, SWE | 2,5 |
| 2 GM Henrik Danielsen, ISL | 2,0 |
| 2 Martin Poulsen, FAI | 2,0 |
| 4 Hans Kr. Simonsen, FAI | 1,0 |
| 5 Helgi Dam Ziska, FAI | 1,0 |
| 6 IM Jens Ove Fries-Nielsen, DEN | 0,5 |

# Herborg setti dreingirnar upp á pláss

**Í fyrru undankappingini til FM í talvi, sum var í Vestmanna leygardagin, vann Herborg Hansen øll talvini og endaði harvið frammanfyri allar dreingirnar**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

44 børn og ung luttóku leygardagin í fyrra innleiðandi umfarinum í FM kappingini í talvi, sum var í Vestmanna. Telvað var í fýra aldursbólkum. Í bólkinum fyri 15-16 ára gomul telvaði Herborg Hansen ímóti sjey dreingjum, og hon vann øll talvini.

Seinna innleiðandi umfarið verður í Klaksvík leygardagin, tá ið endabresturin eisini verður í Klaksvík International. Átta tey samantalt bestu í hvørjum aldursbólkinum kvalifisera seg til sjálva FM kappingina, sum verður í Argja skúla leygardagin 2. desember. Á heimasíðuni hjá Talvsambandi Føroya verður sagt, at tað ber eisini teimum til at luttaka í kappingini í Klaksvík, sum ikki vóru í Vestmanna leygardagin.



*Tað var eingin ivi um, hvør stinnasti telvarin var í aldursbólkinum, 15-16 ára gomul*

*Mynd: www.faroechess.com*

Umframt at tað verður telvað um at sleppa til endaumfarið í FM, er kappingin eisini kvalifikatiónskapping til NM í talvi, sum verður í Íslandi í februar 2007. Føroyameistararnir og nummar tvey í hvørjum bólki sleppa við til ta kappingina.

**Úrslit:**
**1996:** Heðin Gregersen og Høgni E. Nielsen 7 stig.
**1994-1995:** Jóhann Vørmadal 6,5 stig og Einar Gregersen 5,5 stig.
**1992-1993:** Rógvi E. Nielsen 5,5 stig og Heiðrikkur T. Jacobsen 4 stig.
**1990-1991**: Herborg Hansen 7 stig og Rógvi Dragaberg 5 stig (eftir umdyst við Boga H. Eliasen).
Bólkurin 1987-1989 fer ikki at kappast fyrrenn í finaluumfarinum á Argjum.

KÍF-Mjølnir 1-3 (25-22, 18-25, 24-26, 22-25):

# Mjølnir fekk fyrsta sigurin

**Kvinnurnar hjá Mjølni fingu sín fyrsta sigur í ár, tá tær heldur óvæntað vunnu á KÍF í Kollafirði. Sigurin var tó fult uppiborin**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Mjølnir hevur ikki longur sama status, sum tær høvdu fyri fáum árum síðani. Men at tær enn kunnu bíta frá sær, var dysturin í Kollafirði eitt gott dømi um*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍF og Mjølnir hava havt eitt heldur misjavnt kappingarár í ár. KÍF fekk góða byrjan, men nú hava tær tapt fýra dystir á rað, og nú sær ikki gott út hjá KÍF.

Um tað hevur gingið illa hjá KÍF, so hevur gingist uppaftur verri hjá Mjølni. Tær høvdu einki stig fingið undan dystinum ímóti KÍF, men leygardagin bragdaði endiliga hjá kvinnunum úr Klaksvík.

Í fyrsta setti var annars einki sum bendi á, at Mjølnir skuldi fara at fáa stig í Kollafirði. KÍF vann nevniliga hetta settið 25-22. Mjølnir hevði stórar trupulleikar í álopsspælinum, og hetta kom til sjóndar í øllum dystinum. Hóast álopsspælið ikki altíð riggaði so væl, so duga kvinnurnar úr Klaksvík at kempa, og júst hetta eyðkendi tær í restini av dystinum.Tær vunnu nevniliga tvey tey næstu settini 18-25 og 24-26.

Nú var týðiligt, at Mjølnir vildi vinna dystin, og tær gjørdu eisini arbeiði líðugt í fjórða setti, sum tær vunnu 22-25. Sostatt hevur Mjølnir fingið sín fyrsta sigur í ár, og spennandi verður at síggja, um tær nú megna at vinna næstu ferð eisini.